# Ítróttarfelag Fuglafjarðar




## ÍF - Skála

LANDSKAPPING

Leygardagin 15. september 2001

Kl. 16.00 í Fuglafirði

arfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fartel. 22 42 53
Fax 445 053

# F - Skála

umfar í landskapp-
ingini hjá
2. deild monnum
. september 2001

Leikskrá 9

vari:
arfelag Fuglafjarðar

evnd:
i Róin

ir:
Haraldsen, Sosialurin
i Róin

mynd:
ur lyftir bóltin hegnis-
ramvið Lars Muller í
álinum, o'g í netið.
lin er frá 6-0 sigrinum
TB í Fuglafirði 25.
st.
Álvur Haraldsen

:
arfelag Fuglafjarðar

eting:
i Róin



## UPP Á TÍÐINA AT
# VIT LIGGJA NR. 1!

Endiliga eydnaðist tað, sum vit hava bíða leingi eftir leingi. –At verða nummar eitt í 2. deild. Tað man vera langt síðan seinast. Í ár hava vit í øllum førum ikki havt hetta plássi. Og nú ræður um at halda fast.

Eftir at Skála á heimavølli seinasta sunnudag tapti 0-3 ímóti Sumba, gjørdist greitt, at vit liggja einsamallir á odd. Tó anda bæði TB og Skála okkum í nakkan. TB hevur eitt stig færri enn vit, og Skála tvey.

At tað júst skuldu gerast vit og TB, sum - saman við Skála sjálvsagt - skuldu berjast um fyrsta plássið, og harvið beinleiðis uppflyting var ikki serliga sannlíkt eftir fyrstu mongu umførini. Tí eftir at 8 dystir vóru leiktir, lógu vit og TB á ávíkavist á 7. og 8. plássi við 10 og 9 stigum. Síðani tá hevur tað gingist væl hjá báðum liðum, tíverri kanska! Vit hava bert tapt ein dyst, og leikt ein javnt. Tað má sigast at vera ein rættulig uppreisn eftir vánaligu byrjanina, vit fingu á landskappingina. Tað, sum er spell, er, at tað hevur gingið eins væl hjá tvøramonnum, og tí liggja teir í hølunum á okkum. –Onkur vildi kanska hildið, at tað er eitt sindur løgið, tí tá teir vitjaðu okkum næstseinasta vikuskiftið høvdu teir einki at bjóða. Vit vunnu dystin 6-0, og tað var ikki eitt mál ov lítið. Men soleiðis er fótbóltur einaferð, og haldi, at vit sjálvir kunnu ásanna tað, eftir vánaliga avrikið í Havn ímóti einum "krykkuliðið" hjá B36. Hinvegin, so hevur gingist væl hjá Skála í ár, og teir hava alt ár ligið væl fyri á stigatalvuni.

Hetta er vónandi seinasta ferðin vit skrivast í ár, og tí loyva vit okkum at gera nakar hugleiðingar, sum tó ikki nýtast at verða so fjarar kortini.-Fyri at venda aftur til fyrsta plássi og beinleiðis uppflyting, so hevur ÍF ikki vunnið 2. deild síðan 1987. Tí halda vit, at tað er upp á tíðina at vinna hesa deildina aftur. –Men tit, *latið tað ikki blíva til ein vana!*

Helst hittast vit á vøllinum aftur komandi ár. Vit vita tó ikki, um tað verður leygardag ella sunnudag. Lat okkum vóna, at tað verður tað seinna, tað er meira hugaligt, sjálvt um tað hevur verið stuttligt í ár!

Góðan dyst, (og góðan vetur)!





# KUNNU TRYGGJAÐ OKKUM UPPFLYTING Í DAG!

**Er hepni við okkum í dag - sum so ofta áður - kunnu vit tryggjað okkum beinleiðis uppflyting. Men tað skal kempast!**




*Ein heilur og ein hálvur fuglfirðingur stríðast um bóltin - Tórstein og Helgi frá B36 (sonur Malina hjá Martini Hansen) - meðan ein gøtumaður, Heini, hyggur at. Tað ferðina vóru vit aftanfyri allan dystinum. Men í dag verður øðrvísi!*

Í dag kann alt avgerðast. Men tað krevur í øllum førum, at vit vinna. Tí so er Skála úti av myndini í kappingini um pláss í bestu deildini. Umframt tað, at vit vinna, krevst, at leirvíkingar - við okkara Boga á odda - vinna ímóti, okkara næstu kappingarneytum, TB á Sevmýru. Vit vita, at TB eru sterkir á heimavølli, men tað kann henda. Leirvíkingar hava enn nógv at leika fyri, tí teir eru enn í niðurflytingarvanda. Afturat tí, kunnu vit vóna, at teir vilja gera alt fyri at hjálpa okkum at røkka okkara málið. Og leggjast kann afturat, at seinasta vikuskiftið gekk sera væl hjá LÍF. Vit krossa fingrar, at tað eisini ger tað í dag!

Pauli er sera spentur til dystin í dag. –Í dag skulu leikararnir upp til sveinaroynd. Og tað er í dag, teir skulu vísa styrki, sigur Pauli. -Og, leggur hann afturat, eg vænti, at teir klára tað.

Pauli væntar somuleiðis, at grannar okkara úr Leirvík fara at hjálpa okkum í dag. –Eg vænti, at LÍF kann gera nakað við TB. Teir (LÍF, red.) hava spælt upp til fleiri av toppliðunum í seinnu hálvu. Men hann vísir samstundis á, at vit skulu fyrst og fremst hugsa um okkara dyst. -Fáa vit hjálp aðrastaðni, so er tað gott.

Stórar partar av seinastu dystunum hevur tað gingið væl hjá okkum. Leikferðin hevur verið høg. Bóltflytingarnar góðar, og annars hugburðurin sum heild góður. - Fáa vit okkara spæl at rigga í dag, so eru vit rættuliga góðir, sigur Pauli. Hinvegin vísir hann eisini á, hvussu torført tað er, tá tað gongur illa. - Tað

"Í dag skulu leikararnir upp til sveinaroynd."

er torført at fáa menn at taka ábyrgd, tá tað gongur illa. Hava vit ætlanir um flyta upp í bestu deildina, so má hesin hugburður broytast. Men Pauli ásannar samstundis, at hetta tekur tíð.

Skuldi tað eydnaðst okkum at vunni sæti aftur í bestu deildini, so hevur Pauli gjørt sínar tankar. –

(Framhald á bls. 4)

# GONGUR SUM EFTIR ÁNNI HJÁ OKKARA 2. LIÐIÐ

## Eftir ein slaka byrjan uppá kappingina, hevur seinna hálva gingið stak væl. Teir kappast enntá um eitt 3. pláss!

Næst besta liðið hjá okkum hevur rættuliga tikið dik á seg. Eftir ein slaka byrjan, har fyrsti sigurin ikki kom til høldar fyrrenn í 4 umfarið, er vend komin í. Í løtuni eru teir á einum aldutoppi. Teir hava vunnið tríggjar teir seinastu dystirnar, og halda teir fram við góða spælinum og nógvu málskjótingini, kunnu teir røkka eitt triðja plássi. Teir hava 25 stig, og liggja bert tvey stig aftanfyri AB, sum er á triðja plássi.

Um tað er "drypp-á dekn"-árini, sum ger seg galdandi er ilt at siga. Men tað er eingin loyna, at tá tað gongur væl hjá besta liðnum, so setir tað ávíst trýst á næst besta liðið. Tú kanst eisini siga øvugt. -Tí tá gerast møgulig leikarevni til 1. liðið enn sjónligari, og hetta trýstir leikararnar á besta liðnum, at gera innsats hvørjaferð!

Ólavur Ellingsgaard tekur sær av venjingini hjá 3. deild, og tað er eisini hugaligt at síggja nógv fólk á vøllinum til venjing hjá teimum. Tað munar helst eisini!

Góða eydnu tit!

(Framhald frá bls. 3)

Eg valdi at skriva ein tvey ára sáttmála við ÍF, fyri at byggja eitt lið upp. Í ár hevur samanumtikið gingist væl. Somikið væl, at vit nú sjálvir kunnu avgerða, um vit røkka 1. deild. Og røkka vit hesum, skulu aðrar broytingar eisini til, enn bert hugburður, sigur Pauli. -Vit kunnu ikki keyp-a okkum til toppplaseringar. Tað sum umræður, er meir venjing,, og meir grundleggjandi venjing. Síðan skulu vit fáa kjarnuna á liðnum at fungera. So kunnu vit koma langt, heldur Pauli.

Í dag kunnu vit vísa, at vit ætla upp í 1. deild. Men tað gerst bert við einum 100% innsatsi frá øllum leikarum.

Og gestirnir eru ikki hvørjir sum helst. Skálamenn hava stóran part av kappingini ligið - heldur óvæntað, vildi onkur sagt - í toppinum. Seinastu tveir dystirnar hevur tó gingið illa, og teir hava tapt báðar. Tí eru teir í dag á einum triðja plássi, 2 stig aftanfyri okkum. Tummas Olsen, sum er ein av leikarunum hjá Skála, sigur, at tað hevur gingist væl í ár, væl betur enn væntað. -Málið hjá okkum var ikki at flyta niður. Men tað hevur gingist stak væl. -Tó hava vit verið óstøðugir fleiri dystir, og tað merkist nú. Hetta fekk eisini fylgir, tí í eftir tapið ímóti Sumba á heimavølli seinasta vikuskiftið fekk rumenski venjarin, Eugen Voda (sum eisini var málverji) sekkin. Í dag standa tríggir venjara á síðulinjuni. Teir eru Jústines Justinussen, Asbjørn Mikkelsen og Arthur Johansen.

Tummas vísir á, at liðið hjá Skála er sera ungt. -Teir flestu leikararnir eru um 20 til 22 ára aldur. Elsti leikarin er 28 ár. Tí ætla vit at byggja eitt lið upp, sum verður uppaftur betur komandi ár. Tað er eisini vert at leggja tilmerkis, at allir leikararnir á liðnum hjá Skála eru úr bygdunum í økinum. Tummas sigur, at helst verða allir leikararnir, sum í ár hava leikt, aftur við komandi ár. -Og kanska kemur onkur afturat.

Tummas væntar ein ótrúliga „intensan" dyst í dag. - Báðir partar fara at geva seg 100%. Eg trúgvi tó ikki, at talan verður um nakran ljótan dyst. Bæði liðini leika fótbólt, og tað fer helst at koma til sjóndar. Hann heldur ikki, at nakað av liðunum er favorittur, sjálvt um vit hava heimavøll. -Hetta er „vinn ella forsvinn".

Ja, tað er nakað um tað. -Vit ætla okkum í øllum førum ikki at forsvinna.





## TÚ

**Navn:** Roy Róin
**Føðingardagur:** 03.12.1970
**Føðistað:** Fredrikshavn
**Starv:** Leiðari (Shellstøðin í Gøtudali)
**Pláss á vøllinum:** Miðvallari
**Hædd og vekt:** 0,0017 km. og 0,065 t.
**Yvirtrúgv:** Onga
**3 orð sum lýsa teg:** Tvørur, tvørur og tvørur
**Torførast mótstøðumaður:** Fíggjarmálaráðharrin (Karstin Hansen)
**Frítíðarítriv:** Fótbóltur
**Vónir fyri 2001:** Lotto millióningur

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** Egveit ikki
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** 1978, gamal ha??
**Aðrar ítróttargreinar:** Flogbólt, um ikki fótbólturin var farin við allari frítíðini
**Minnigarríkasti dystur:** Ímóti TB á heimavølli. Bleiv útvístur eftir tveimum minuttum, tá eg bjargaði við hondini á málstrikuni
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** Í Íslandi við smádreingjunum hjá ÍF. Bergtóra (Jakobina) átti lívið í okkum

**Besti fótbóltsleikari:** Nesta
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Flogbólt
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Teknik
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Eg vil ikki úttala meg, Pauli dugir at lesa
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Real Madrid

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Ræst kjøt og øl
**Slag av tónleiki:** Rocktónleik
**Sjónvarpssending:** "Vor værste år"
**At slappa av:** Arbeiði
**Troyggja nr.:** nr. 6
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Eric Cantona
**Sjónvarp/ filmstjørna:** Antony Hopkins




**Besta bók/ blað:** Leikskráin (hesuferð, altso)

**Limir í PM-samtakinum:**

# *Á rætta stað til røttu tíð*

Wholesale

.Group

fóm
Icecream

ATLANTIC
PARTNER A/S
Copenhagen
Sales Company

Transport



- Stórkøkar
- Handlilsvørur
- Grill & Pylsuvognar
- Cafeteria



- Bakaravørur
- Proviantur
- Útbreiðsla
- Flutningur



**P/F Poul Michelsen**
Hoyvíksvegur 74, P.O.Box 200, FO-110 Tórshavn
Tel +298 31 46 50, Fax +298 31 81 63, e-mail: pm@pm.fo



*Føroya størsta úrval av*
**pakkitilfari úr karton**
**bylgjupapp**
**og plast**
***innan øll vinnuøkir***



FARPACK

Staravegur 5, P.O. Box 3099,
FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
telefon +298 35 30 00, fax +298 35 53 10
farpack@farpack.com, www.farpack.com

## Altíð nýbakað breyð

Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:

- Statoil í Leirvík
- Hjá Halluri í Gøtu
- Hjá Rannvá í Søldarfirði
- Statoil í Saltangará
- Kiosk Vár í Saltangará
- Statoil á Strondum

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388



**Salong Yndi**
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490



the MILLENNIUM magic

ANNA
530 Fuglafjørður
tel. 444 899

## Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

## Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

## Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

## Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

HAVSBRÚN

Havsbrún Ltd. • 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 • fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo



SKF

Umboð í Føroyum

ES P/f Esmar Simonsen
Kambsdalur • Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29






**Alfa Seafood Sp/f**

Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • E-mail: alfa@post.olivant.fo

JÓNA DANSAR Í
*LONDON*
*...men*

petur & petur • 320870

hon hevur framvegis
eitt gott samstarv
við Føroya Banka!



kontoIN
okkara ungdómskonto

**Stórt úrval av steypum og heiðursmerkjum til allan ítrótt**



Verið vælkomin inn á gólvið

P/F LEIVUR ELLINGSGAARD
OPTIK - URSMIÐJUR
Tel. 45 52 03 - FO-700 Klaksvík

# Eykalutir!
**-til tann besta prísin**



# Fa. Billutir
410 Kollafjørður
tel. +298 421605 fax +298 421666
e-mail: billutir@post.olivant.fo

**Landsins største og besta úrval av ítróttarheiðursgávum**

Steyp
Heiðursmerki
Heiðursbrøv
Toy við búmerki
Streamers
Klistrimerki
Seruppgávur við gravering

**Vit seta titt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað**

FA. EILIF ARGE
KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76

**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |

KJ
**Altíð til tygara tænastu**
tá ið tað snýr seg um:

HYDRAULIK
RÁÐGEVING
VERKÆTLANIR
ÍSETANIR
UMVÆLINGAR
MASKINUMVÆLINGAR
SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING



**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispol)
- Rapp Hydema Syd (garna- og linuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brennioliu og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (idnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**Á goymslu:**
Hydr. slangur og fittings, hydr. rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúluleigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tætningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.

KJ-HYDRAULIK
P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com

# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**fuglafjarðar kommuna**

tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo



**Stórt úrval av vøkrum klæðum til børn og ung upp til 16 ár**

**Stórt úrval av skóm til alt brúk og allar aldursbólkar**

**TOYSTOVAN**

FUGLAFJØRÐUR TEL. 44 46 37

**VØRDSLAN**

**WEARHOUSE**

**Altíð fyrst við tí síðsta**



VASKOT
YSIOTERAPI
☎ 44 51 44

**Tannlæknastovan**

hjá

***Steintór Larsen***

Torkilskrókur 8
530 Fuglafjørður
tel. 444 358




GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71



# Vit selja ikki tryggingar, men trygd

Hjá Trygd fært tú persónliga ráðgeving - eisini eftir at skaðin er hendir. Tryggingarnar hjá Trygd fevna um:

- Sethúsatrygging
- Familjutrygging
- Ferðatrygging
- Biltrygging og Trygd Bilhjálp
- Sjóvátrygging

Vilt tú hava meira at vita um okkara tryggingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Føroya Banka ella við Trygd.

**TRYGD**

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 fax 31 72 11

# Tann nýggi Nissan Almera






**Nýggi dieselmotorurin**

Diesel Turbo
2.2
110 HK
Prísur: **185.000,-**



**Eykaútgerð**

Fáast eisini við eykaútgerð, sum prýður um

**P/F Meinhardt Arge** NISSAN

**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

Toy & Tógv • 530 Fuglafjørður • tel. 444 494



**BAADER®**

*Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu*

**P/F Petur Larsen**
Postmoga 64 - 530 Fuglafjørður
tel. 444 174 - fax 444 285 - fartel. 214 174

**HS DEKK**
**22 20 18**
T-postur:hs-dekk@post.olivant.fo





# JBS-TRÆ

Snikkarakjallarin

Fløtugerði 34

530 Fuglafjørður

Tel. 444 784

www.JBS-TRA.subnet.dk




E&B VIRKIÐ

Element- og Betongvøruvirkið við Gjógv

tel 423173/445173
fax 444773

e-bvirki@post.olivant.fo






O·N·L·Y

VERO MODA

KATO Fuglafjørður

**Danny Transport**

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

*Stuðlið føroyskari heimavinnu!*

*Keypið føroyskar dygdarlutir frá*

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

*sum heldur til í "Piddasahandli"*

*Tel. 444 427*

*Opið er hvønn dag*

# Leiga buss??



Vit hava ein buss til 16 persónar.
Harav serútgjørdur til 8 ferðandi í rullustóli.
Vit eru altíð til reiðar at samráða eina nøktandi loysn fyri báðar partar.

**Andreas Poulsen**
Syðrugøta tel. 22 52 20 ella 44 17 20

*Reiðari innan frakt- & sandbátar*
*Krana- og lastvognskoyring*
*Sandsøla*

**SANDGREVSTUR**

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921

# Annleggs- og Urtagarðsarbeiði



- Flísar og betongsteinar
- Steinseting (brolægning)
- Grasvallir
- Planting
- Felling og røkt av trøum og runnum
- Ráðgeving
- o.a. urtagarðs-arbeiði

**Búgvi Róin** · Fløtugerði 14
530 Fuglafjørður · tel. 21 04 25

# Lastvognskoyring




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**
530 Fuglafjørður
tel. 444 245 ella 217 245





# Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:
- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)
☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo

# ORKUSPARANDI STOYPIJARNSKETIL

Logica ketilin er ein av teim førandi stoypijarnsketlinum á marknaðinum. Brúk verður tikið av ný tøkni innan orkusparing, ið tryggjar kundanum tann bíligasta raksturin.



Ketilin er lættur at reinsa, og er ljóð isoleraður





Tekningin her vísir hvussu gongdin hjá roykinum er gjøgnum ketilin. Dentur verður lagur á at ongin hiti fer til spillis.

Leysar roykforingar eru við til at økja um bíligan rakstur



LOGICA

**VVS HORNIÐ spf**
Landavegur 2 . Tórshavn
Tel 318023 / Fax 310963
vvshorni@post.olivant.fo


Úrvalsbilar Spf.
Søla av brúktum innfluttum bilum.
Alt vanligt verkstaðs-arbeiði verður gjørt.
www.bilar.fo
ÚRVALSBILAR
ÚB
Úrvalsbilar Spf.
Bakkavegur
FO-530 Fuglafjørður
Telefon: 444943
Telefax: 444638
Fartel.: 281943




kvik
Nýggjan køk...?
Køkssentrið sp/f
Smærugøta 6, Postboks 3182, 100 Tórshavn
Tel 31 24 80, Fax 31 97 18




www.sparikassin.fo



Út at stima á alnótini...

Á heimasíðuni hjá Føroya Sparikassa, www.sparikassin.fo, finnur tú eitt góðadagaland.
Sethúsamarknaður, gjaldoyrayvirlit og láníútrokningar eru bara nakrir av teimum nýggju møguleikunum á www.sparikassin.fo.
Føroya Sparikassi hevur tikið enn eitt stig inn í framtíðina

FØROYA SPARIKASSI



# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)



Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.



Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....

Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.

HEWLETT® PACKARD
Expanding Possibilities

# J.J-teld

530 Fuglafjørður

Tel. 444 487




Siro GC Ti
Stødd: 5-12 + 13
799,-





PUMA
Volante GC Ti Jr.
Stødd: 28 - 35
499,-





P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR N. Finsensgøta 5 Postmoga 1108 FO-110 Tórshavn

Fuglafjarðar Keypsamtøka
Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895






# ÁRSINS
## ÍF´ARI 2001

## BLAÐSTJÓRIN BESTUR SEINAST!



Í ódnarveðrinum seinasta vikuskiftið ímóti grannunum úr Gøtu, hættaðu nakrir áskoðarar sær at atkvøðu um dagsins mann. Rógvi var valdu til besta leikarin, og tað fær hann ein sunnudagsdøgurða fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku!!

### Atkvøðutal

| | ÍF-GÍ | Íalt |
|---|---|---|
| Rógvi Róin | 32 | 49 |
| Roy Róin | 18 | 143 |
| Heini Heinason | 15 | 23 |
| Mortan Thomsen | 10 | 39 |
| Áki Petersen | 9 | 84 |
| Viggo Johannesen | 7 | 42 |
| Tórstein Joensen | 6 | 59 |
| John Thomsen | 6 | 8 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av

Restaurant Muntra

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá

HARALDSEN
- títt keyp -

## Atkvøðuseðil

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________
Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________
Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________
Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ____________ Tel.: ____________

# HAGTØL & FAKTA

## STØÐAN 2. DEILD MENN - 9. september

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. ÍF | 16 | 9 | 2 | 5 | 50-28 | 29 | 6-1-1 | 3-1-4 |
| 2. TB | 16 | 8 | 4 | 4 | 41-31 | 28 | 6-1-1 | 2-3-3 |
| 3. SKÁLA | 16 | 7 | 6 | 3 | 27-17 | 27 | 4-3-1 | 3-3-2 |
| 4. B36 | 16 | 8 | 2 | 6 | 38-34 | 26 | 4-1-3 | 4-1-2 |
| 5. Sumba | 16 | 6 | 4 | 6 | 36-32 | 22 | 3-3-2 | 3-1-4 |
| 6. NSÍ | 16 | 7 | 1 | 8 | 30-32 | 22 | 6-0-2 | 1-1-6 |
| 7. HB | 16 | 6 | 3 | 7 | 30-31 | 21 | 5-2-1 | 1-1-6 |
| 8. LÍF | 16 | 5 | 4 | 7 | 30-32 | 19 | 4-1-3 | 1-3-4 |
| 9. KÍ | 16 | 4 | 4 | 8 | 21-31 | 16 | 3-3-2 | 1-1-6 |
| 10. GÍ | 16 | 3 | 4 | 9 | 20-43 | 13 | 2-2-4 | 1-2-5 |

## STØÐAN 3. DEILD MENN - 9. september

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. VB | 16 | 14 | 0 | 2 | 68-21 | 42 |
| 2. Royn | 16 | 12 | 2 | 2 | 61-16 | 38 |
| 3. AB | 16 | 9 | 0 | 7 | 41-37 | 27 |
| 4. ÍF | 16 | 8 | 1 | 7 | 47-46 | 25 |
| 5. B68 | 16 | 7 | 0 | 9 | 32-37 | 21 |
| 6. B71 | 15 | 6 | 2 | 7 | 39-53 | 20 |
| 7. B36 | 16 | 5 | 4 | 7 | 44-39 | 19 |
| 8. TB | 16 | 4 | 2 | 10 | 26-44 | 14 |
| 9. GÍ | 15 | 3 | 3 | 9 | 26-43 | 12 |
| 10. KÍ | 16 | 3 | 2 | 11 | 25-68 | 11 |

## Kort - landskapping

| Leikari | G | R |
|---|---|---|
| Heini Heinason | 3 | |
| John S. Thomsen | 3 | |
| Tórstein Joensen | 3 | |
| Roy Róin | 1 | |
| Mortan S.Thomsen | 2 | |
| Høgni á Lakjuni | 1 | |

## Aðrir dystir í dag 2. deild

GÍ - NSÍ
B36 - HB
TB - LÍF
KÍ - Sumba

## Dystir í 1. deild 16.09 - 16. umfar

GÍ - BSÍ
KÍ - B36
HB - EB/Streymur
VB - B71
B68 - FS Vágar

## Dystir í 3. deild 16.09 - 17. umfar

GÍ - Royn
KÍ - B36
AB - TB
VB - B71
B68 - ÍF

## Vert at vita

Komandi leygardag, 22. september, er (vónandi) seinasti landskappingardystur. Tá spæla okkara menn í Runavík ímóti NSÍ.

3. deild spælir í morgin ímóti B68 á Toftum. Næsta leygardag spæla teir heima ímóti KÍ. Hetta er samstundis seinasti dystur hjá 3. deild.

Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so er tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 29, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini Ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.





## SOLEIÐIS KANN EIN
# LEIKSKRÁ GERAST!

**Tað nýtist ikki altíð at gerast upp á kostnaðarmiklasta háttin - hitt ber eisini til!**

Vit eini vanligari teldu, einum skrivara - sum helst eisini spælir fótbólt við okkum - tveimum eldri (les: gomlum) dírkdrivnum ommum (les: arbeiðsgrevum), eini vanligari kopimaskinu og ikki at gloyma tí partvís heimagjørdu "klipsimaskinuni" frá P/F Petur Larsen. So bíligt og lætt (tungt?) kann tað eisini gerast. Tað, tú stendur í hondini við í dag, er tó kanska ikki eins gott, sum tær fínu leikskráirnar, sum fleiri av 1. deildarliðnum gera til sínar heimadystir. Men veruliga -úrslitið/meiningin man tó verða nakað tað/tann sama, tá alt kemur til alt. –Eitt sindur av lesnaði áðrenn dystin, í hálvleikinum, og hjá onkrum, kanska eisini eftir loknan dyst. Og ikki minst, eitt fitt fíggjarligt íkast í kassan hjá ÍF. Og fyri tað, vilja vit takka okkara sera trúgvu lýsarum fyri! Uttan tykkum, eingin leikskrá!

Hvussu verður komandi ár kann bert gitast um. Helst vera vit til dystin fús. -Um tað verður á hendan hátt, ella á annan hátt er ikki víst. Men til ta tíð, hav tað gott!



*Hendan klipsimaskinan hevur verið trúgv í ár. Vónandi heldur hon líka leingi sum "prentararnir"*

# KIOSKIN ER OPIN
## - Í OVARU HÆDDINI

Aftur í ár er kiosk í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Kioskin er opin meðan dysturin er, og røsku damurnar í kioskini hjá ÍF selja kaffi, te, køkur og góðgæti. .



Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fartel. 22 42 53
Fax 445 053

*Aðalnevndin:*
Formaður.
Jón N. Olsen, tel. 444 650
Varaformaður:
Njal R. Petersen, tel. 444 994
Skrivari:
Hjalti Lundsbjerg, tel. 444 079
Peningarøkil:
Andrea Lervig, tel. 444 267

*Fótbóltsdeild:*
Formaður:
Sonni Jensen, tel. 444 975
Ragnhard Petersen, tel. 444 353
Hildigarð Eliasen, tel. 444 052

*Samskipanarleiðari:*
Unn E. Petersen, tel. 444 053

*Venjarar:*
*2. Deild:*
Pauli Jarnskor, tel. 441 353
*3. Deild:*
Ólavur Ellingsgaard, tel. 21 26 86
*4. Deild:*
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
*5. Deild:*
Old Boys:
Sonni Jensen, tel. 444 975
*Unglingar:*
Áku Petersen, tel. 444 419
*Dreingir Ø.:*
Andrew Hansen, tel. 444114
*Smádreingir Ø.:*
Áku Petersen, tel. 444 419
*Piltar M.:*
Ragnhard Petersen, tel. 444 353
*Smágentur:*
John/Birgar, tel. 444 402/25 03 25
*G.10-12 ár:*
John Thomsen, tel. 444 402
*Smápiltar:*
Bogi/Hanus, tel. 444 347/444 052
*Pinkur:*
Hanna Lassaberg, tel. 444 401

## ÍF

1. Rúni Joensen
2. Janus Petersen
4. Viggo Johannesen
5. Ken Bærentsen
6. Roy Róin
7. Eyðun Ryggshamar
8. Mortan S. Thomsen
9. Heini Heinason
10. Bárður á Lakjuni
11. Eyðolvur R. Petersen
12. Rógvi Róin
13. Tórstein Joensen, liðs.
14. John S. Thomsen
15. Høgni Zachariassen
16. Fróði Poulsen
17. Jan Jørgensen
18. Áki Petersen
19. Høgni á Lakjuni
20. Hanus Eliasen

Venjari: Pauli Jarnskor
Hjálparv.: Ólavur Ellingsgaard
Liðleiðari: Jóhan Símun Joensen

## Skála

____ Leivur Justinussen
____ Pauli Poulsen (liðs.)
____ Bent Djurhuus
____ Ronni Hansen
____ Kajsten Rasmussen
____ Sveinur Justinussen
____ Pauli Hansen
____ Tummas Olsen
____ Marius Joensen
____ Alexandur Johansen
____ Bogi Gregersen
____ Ingi Hansen
____ Jarius Trygvason
____ Jørmund Joensen

Venjarar: Jústines Justinussen
Asbjørn Mikkelsen
Arthur Johansen

## Dómarabólkur:

Dómari: Suni Johansen
Linjuverjar úr SÍF

## Bóltsponsorur:

Njal R.-Petersen